# Færri velja eftirskúla

Tað gongur illa hjá teimum donsku eftirskúlunum at fáa nóg nógvar næmingar, og orsøkin er efrtir øllum at døma, at fólk hava ikki so nógvar pengar um hendi orsakað av fíggjarkreppuni og hava tí ikki ráð at lata børnini fara á eftirskúla. Eitt eftirskúlaár kostar umleið 40.000 krónur. Í einari kanning í februar søgdu 76 eftirskúlar, at eftirspurningurin eftir plássi var minni enn í fjør, og nú siga 90 av teimum 263 eftirskúlunum, at teir hava pláss fyri fleiri næmingum. Ein talsmaður fyri eftirskúlkafelagið sigur við Ritzau, at fleiri foreldur hava boðað frá, at tey noyðast at raðfesta pengarnar til okkurt annað enn eftirskúla.



# Skeivt hjarta

Inge-Lise Jensen, sum býr í Kolding í Danmark, fekk einki minni enn ein hvøkk, tá hon fyri stuttum fekk eitt bræv við úrslitinum av einari hjartakanning. Brævið var frá sjúkrahúsinum í Frederikssund, men tað vísti seg, at tað var ikki Inge-Lise Jensen í Kolding, sum skuldi hava tað, men ein maður í Frederikssund á Sælandi. Mistakið komst av, at Inge-Lise og tann rætti bræveigarin búgva í Lundbjergvej 28, men hon í Kolding og hann í Frederikssund. Postverkið hevur biðið um umbering fyri mistakið, skrivar JydskeVestkysten.

# ementi

*Konsertin hjá Eivør varð stuðlað við egnari listaframsýning undir heitinum, Eygu Hugans. Á framsýningini eru níggju málningar, hon hevur málað seinasta árið*

*Myndir: Álvur Haraldsen*







sjúk. Aftur her var samanspælið millum parið ómetaliga stuttligt at síggja og hoyra, har hann við gittaranum hermdi eftir hennara ljóði.

## Eivør og eygað

Fyrr um dagin var fernisering í Norðurlandahúsinum. Tað vóru málningar hjá Eivør sjálvari, ið prýddu dansistovuna í Norðurlandahúsinum. Flestu av málningunum eru málaðir í ár og í fjør, men teir eru eisini úrslit av fríløtum á gistingarhúsrúmum, tá hon hevur verið á konsertferð. Fyri nøkrum árum síðan hevði hon sína fyrstu og einastu listaframsýning, og tá seldi hon hvønn tann einasta málning. Hesa ferð vóru 10 málningar við, týðiliga við íblástri úr til dømis India. Á onkrum av málningum er stílurin at líkna við stílin á gomlu málningunum, og hava teir eitthvørt andaligt yvir sær. Framsýningin hevði fingið heitið, Eygu Hugans, og gekk hetta eygað aftur í fleiri av málningum, umframt í einum listaverki, ið stendur miðskeiðis í rúminum.

Tað vísir seg ikki at vera tað tingið, Eivør ikki kann ella dugir. Aftur hesa ferð bergtók hon, og verður saknur í henni í summar, tá hon verður burturstødd meðan festivalarnir eru. Næstu ferð hon verður at hoyra, verður saman við ORKA tá Stuðulskonsertin verður í Norðurlandahúsinum 7. mai.